# Tyngdin og royndirnar vóru á muni

**Ungu og óroyndu gøtumenninir megnaðu ikki at fáa nakað burturúr, tá ið royndu klaksvíkingarnir við størri tyngd vitjaðu**

GÍ–KÍ
*Jóannes Hansen*



Klaksvíkingar fóru Dýra biðjudag úr Sarpugerði í góðum hýri. Bæði teir, sum fóru ígjøgnum bergholi til Leirvíkar, og teir, sum ferðaðust upp á gamla mátan og stutt undan dystarbyrjan umborð á útróðrarbátum vóru komnir skúmandi inn eftir Gøtuvík.

Leikliga avrikið hevði ikki verið nakað at reypa av. Men tað løgdu gestirnir, sum høvdu verið í Gøtu, vertin á. Tað ráddi um at fáa øll trý stigini, og tað eydnaðist.

Einasta málið fekk KÍ, tá ið seinna umfarið var stívliga hálvrunnið. Eftir diagonalt skifti úr høgru, var tað Hjalgrím Elttør, sum av brotsteigarmarkinum í vinstru og einar tíggju metrar frá baklinjuni sendi tvørtur um aftur. Bólturin skapp at ferðast framvið málinum og aftur um handara stólpan, har bólttryggi miðvallarin í høgru, Atli Danielsen, varð leysur og við knøunum og lørunum stýrdi bóltinum framvið Jacek Przybylski og í málið.

Hvørki GÍ málverjin ella Kartin Joensen í KÍ málinum høvdu aðrar uppgávur at síggja til. Tað vóru stutt sagt ikki aðrar royndir ímóti málinum teir 90 minuttirnar í góðveðrinum í Norðragøtu.

Fyrstu løtuna var Popczynski tvær ferðir um reppið at gerast leysur, men hann kendi ikki sína vitjunartíð. Í báðum ferunum fór hann frá miðstrikuni og royndi at renna frá í hesum ferunum ikki ov væl skipaðu verjuni. Í tí fyrra førinum varð møguleikin heilt góður, men Popczynski tøvdi eitt vet, og so megnaði skilagóði Jan Andreasen at skerma av. Í seinna førinum tøvdi Popczynski eitt sindur og fór til høgru, hann spældi ikki væl staddar viðspælarar, og so syrgdi KÍ verjan fyri, at møguleikin hvarv. Tíðliga í 2. hálvleiki fekk Popczynski gula kortið, tí dómarin metti, at hann hevði verið ov nógv sjónleikari, tá ið hann – eftir at innlegg var komið úr høgru – fór um koll í brotsteiginum. Og eina ferð seinni vísti venjarin aftur, at tað er fyrst og fremst hann, sum verður roknaður sum álopshóttan hjá GÍ. Eftir KÍ hornaspark!, fór GÍ í skjótt álop, verjuparturin hjá KÍ var illa skipaður, og tað eydnaðist akkurát at beina bóltinum til GÍ horna, áðrenn Popczynski kundi royna ímóti málinum.

Ove Nysted – hóast hann spældi við sera smáum marginalum, so var hann stinnur í miðverjuni – hevði tvær tær bestu KÍ royndirnar, umframt málið hjá Atla Danielsen. Í tí fyrra førinum sendi hann úr 73! metrum. Bólturin stakk í vøllin og upp um eitt sindur uttarlaga stadda málverjan, sum tóktist vera um ein háls, men bólturin dalaði niður í nettakið. Í tí seinna førinum royndi Ove at stúta frísparksinnlegg, men bólturin fór við síðuna av.

### Munurin var í tyngdini og royndunum

Talan var um lítið av samanhangandi fótbóltsspæli. Heldur vóru tað oftast langar og/ella høgar sendingar og adressan var heilt ofta ókend. KÍ var eitt vet omaná. Serliga í 2. hálvleiki funnu teir viðhvørt betri hvønn annan, enn heimamenninir gjørdu. Klaksvíkingarnir vóru betri fyri í nærdystunum, og tað sást, at spælararnir hjá KÍ høvdu væl fleiri royndir, enn gøtumenninir, sum ikki fyltu so nógv, og sum vóru sera strongdir, og harvið sparkaðu meiri, enn GÍ hevur gjørt øll tey árini, teir hava verið í bestu deildini.

Aftur hesa ferð høvdu skaðar við sær, at tað vóru blaðungir dreingir – Símun Samuelsen, Símun Louis Jacobsen og Høgni Madsen – sum royndu at stríðast ímóti Allani Joensen og hansara monnum á sentrala miðvøllinum, og sjálvandi sást tað á GÍ avrikinum, at Súni Olsen og Gidek ikki vóru tøkir.

KÍ spældi 4–4–2, og GÍ var í 3–5–2 útgangsstøðu. Hans Pauli Petersen var ytstur høgru megin, og Bárður á Lakjuni, sum var ein tann bólttryggasti av teimum gulu og noyddist at taka seg burturúr, tá nakrir minuttir vóru eftir, var ytstur vinstrumegin.

Símun Louis Jacobsen tóktist at hava sum høvuðsuppgávu at halda Allani Joensen burtur frá bóltinum, og setningurin hjá Poul Andriasi Jacobsen í verjuni var at hanga uppií Hjalgrími Elttør. Tjóðrið hjá lyklaspælarunum hjá KÍ var ikki langt, men hjá Hjalgrími var tað nóg langt til, at hann átti avgerandi fót á í sambandi við sigursmálið.

Tá ið KÍ var komið á odda, royndi GÍ at flyta fólkið fram, og tá hevði KÍ møguleikar í snarálopum, sum stóðust av, at GÍ misti í uppspælinum. Hjalgrím, sum var óførur at halda bóltinum frammi á vøllinum síðstu løtuna, var tvær ferðir tætt við, men honum eydnaðist ikki at skjóta.

**GÍ–KÍ 0–1 (0–0)**
**0–1: Atli Danielsen 69.**
**GÍ:** Jacek Przybylski – Poul Andrias Jacobsen, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – HansPauli Petersen, Símun Louis Jacobsen, Símun Samuelsen, Høgni Madsen, Bárður á Lakjuni (Hanus Jacobsen, 79.) – Krzystof Popczynski, Magnus Skoralíð (Áslakur R. Petersen, 85.)
**KÍ:** Kartin Joensen – Sámal Eyðfinn Akursmørk, Ove Nysted, Jan Andreasen, Harley Bertholdsen – Atli Danielsen, Allan Joensen, Fríðin Ziskason (Símun Joensen, 71.), Arnold Joensen – Hjalgrím Elttør, Eyðun Klakstein (Erling Fles, 67.)

# Óli Johannesen og Hvidovre fingu javnt

**Óli spæli ein góðan dyst við Hvidovre í 1-1 javnleikinum móti Brønshøj. Christian Høgni slapp ikki uppí part, tá Vejle tapti 5-4 móti AC Horsens**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Óli Johannesen og liðfelagar hansara í Hvidovre stríðast fyri at lívbjarga sær í næstbestu donsku deildini. Um vikuskiftið endaði tað við 1-1 javnleiki á útivølli móti Brønshøj.

Óli Johannesen varð hesuferð fluttur av miðvøllinum og aftur í verjuna, tí ein annar verjuleikari er skaddur.

Hvidovre kom framum við einum sjálvmáli beint fyri steðgin og høvdu tí góðar vónir til seinna hálvleik. Men Brønshøj, sum eisini liggur í tunga endanum, megnaði at javna stutt inn í seinna hálvleik.

Sagt verður, at Óli Johannesen spældi ein góðan dyst fyri Hvidovre, sum hevði fleiri góðar møguleikar at skora sigursmálið seint í dystinum.

Hvidovre liggur næstaftast á stigatalvuni, men hevur enn góðan møguleika at vinna seg upp um niðurflytingarstrikuna, tí liðini omanfyri eru ikki farin úr eygsjón.

### Christian Høgni ikki við

Vejle berjist hinvegin við at vinna seg uppaftur í Superliguna og tók ímóti AC Horsens á heimavølli. Horsens vann 5-4 eftir at hava verið á odda 4-0 eitt skifti í fyrra hálvleiki. Vejle eltir Frem á øðrum plássi og misti harvið trý týdningarmikil stig. Christian Høgni slapp ikki uppí part á hesum sinni og var ikki við í hópinum.

Horsens legði seg framum 4-0 eftir hálvum tíma, áðrenn Vejle svaraði aftur. Heimaliðið javnaði síðani til 4-4, áðrenn Horsen fekk sigursmálið, tá fimm minuttir vórðu eftir at spæla. Málini hjá Hvidovre skutu Tommy Knudsen, Ulrik Balling, Peter Degn og Michael Blom.

# NSÍ sektaði mistøkini hjá Skála

**Silvurvinnararnir gjørdu sær dælt av brotssparki, sum var fullkomuliga óneyðugt og av misskiljing millum málverja og miðverja hjá skálamonnum**

NSÍ–SKÁLA
*Jóannes Hansen*



NSÍ gjørdi tað, sum teir skuldu, tá ið Skála vitjaði við Løkin. NSÍ vann 2–0, teir fingu trý stig á kontoina, og teir komu undan trýstinum, sum tað altíð er at vera stórfavorittur á heimavølli ímóti liði, sum av mongum verður roknað millum mest uppløgdu evnini at detta niður í lægri deild.

Men tað vóru avgjørt glottar at hóma á Skála liðnum, sum í løtum í fyrra hálvleiki og eisini fyrstu løtuna eftir steðgin vísti frægasta fótbóltsspælið, sum var at síggja. Serliga vóru tað sentralu miðvallararnir, sum vóru skilagóðir. Ársins spælari í hondbóltinum, Sveinur Justinussen, sum bara hevur vant, síðani eina viku eftir at hondbóltskappingin var av, gjørdi so at siga einki mistak. Hann dugdi væl at søkja røttu støðurnar, og hann valdi altíð einfaldu avspælingarnar. Aleksander Jovevic vísti eisini gott hegni, og hann er heilt víst fongur hjá Skála, serliga um hann minnist til at sleppa sær eitt vet skjótari av við bóltin, enn hann í so ofta gjørdi hesa ferð.

Trupulleikin hjá skálamonnum var, at teir ikki megnaðu at spæla seg til upplagdar møguleikar. Jens Martin Knudsen í NSÍ málinum var so at siga arbeiðsleysur. Sjálvandi kom tað illa við hjá Skála, at einasti landsliðsspælarin hjá teimum, Jónhard Frederiksberg, longu miðskeiðis í fyrra umfarinum noyddist at taka av seg vøllinum, tí hann hevði fingið meint spar í knæið. Pétur Geir Svavarsson loysti av. Íslendingurin er komin til Skála fyri góðum mánað síðani, men hann er ikki so mikið sannførandi, at hann er upplagt fyrsta val sum álopsspælari í staðin fyri Boga Gregersen.

### Styrkin at sekta

NSÍ arbeiddi nógv, men teir høvdu trupult við at fáa fótbóltsspælið at hanga saman. At Gerg Langgaard og Kári Hansen ikki vóru við var stórur saknur. Í álopinum stríddust brøðurnir Helgi og Sonni L. Petersen, og teir vóru uppií so at siga hvørja ferð, tá ið vandi var frammanfyri málið hjá Eugen Voda. Í 1. hálvleiki royndi Helgi eftir fríspæling frá bróðrinum at lyfta upp um Skála málverjan, sum fekk fingurin á, og í 2. hálvleiki, tá ið støðan var 1–0, hevði Sonni eftir fríspæling fra Iani Højgaard, stóran møguleika úr stuttari fjarstøðu í vinstru. Hann var eitt sindur trongdur, og málverjin fekk hondina á bóltin.

NSÍ setti hol á, tá ið tað restaðu átta minuttir av fyrra umfarinum. Lassin Isaksen bríkslaði fyri brotssparki, sum skálamenn púra óneyðugt høvdu framt. Eftir innkast í vinstru var Sjúrður Jacobsen afturi við baklinjuna á veg úr brotsteiginum, tá ið beinini vórðu tikin undan honum. Brynjolvur Nielsen var enn eina ferð tryggur úr ellivu metrum.

Eftir at Skála fyrstu løtuna eftir steðgin hevði verið væl við, setti heimaliðið teir upp á pláss. Skála spælararnir vórðu so mikið kroystir, at teir gloymdu ella ikki kendu seg at hava tíð at spæla. Sentralu miðvallararnir vórðu lopnir um, og so øktist trýstið á teirra verju.

Spenningurin og harvið intensiteturin hvarv, tá ið tað restaðu átta minuttir, og aftur var talan um verjumistak. Brynjolvur Nielsen legði úr høgru og fram ímóti brotsteiginum. Agnar Højgaard hevði møguleikar at beina bóltinum butur, men hann drálaði – ivaleyst tí hann roknaði við, at málverjin skuldi taka bóltin – og so stakk arbeiðssami Sonni L. Petersen seg fram ímillum teir báðar, sneiddi framvið málverjanum og setti í málið.

Jógvan Martin Olsen hevði valt at geva unga Jústinus Hansen møguleikan í høgru fyri skadda Gert Langgaard. Ungi maðurin hevði í fyrra umfarinum stóran møguleika at skjóta mál, men tað miseydnaðist. Eftir frísparksinnlegg frá Sjúrði Jacobsen var Jústinus leysur, men royndin fór omanfyri málið. Hann man kortini fara at skjóta mál um ikki so langa tíð.

**NSÍ–Skála 2–0 (1–0)**
1–0: Brynjolvur Nielsen br 38.
2–0: Sonni L.Petersen 83.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen – Jústines Hansen (75: Andy Olsen), Ian Højgaard, Rúni Rasmussen, Jónstein Petersen (88: Áki L. Hansen) – Sonni L. Petersen, Helgi L. Petersen
**Skála:** Eugen Voda – Arnold Berg, Dusan Jaic, Agnar Højgaard, Iulian Floresco – Hanus Thorleifsson, Alexander Jovevic, Sveinur Justinussen, Alexandur Johansen – Pétur Geir Svavarsson, 25.), Bogi Gregersen

HB - FS Vágar 3-1 (2-0)

# Meistararnir fingu góða byrjan

**HB kom væl frá byrjan í landskappingini, tá havnarliðið vann 3-1 á uppflytarunum úr Vágunum. HB var betra klárt betra liðið, men spenningurin helt sær tó til móti endanum av dystinum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Bæði liðini, sum vóru á vøllinum í Gundadali Dýra Biðidag, fingu gullmerki um hálsin eftir seinasta kappingarár. HB sum føroyameistarar í 1. deild og FS Vágar sum vinnarar av 2. deild.

HB skal verja sítt meistaraheitið, meðan FS Vágar skal verja sítt pláss í bestu deildini.

HB legði væl fyri, og støðan var longu 2-0 eftir ein hálvan tíma. HB var meira ágangandi og nógv vandamiklari í álopsspælinum enn FS Vágar, sum ikki hevði nakað serligt at bjóða uppá í fyrra hálvleiki.

### From leggur fyri

Danin Carsten From fekk sítt fyrsta mál í føroysku landskappingini eftir átjan minuttir, tá hann varð spældur leysur av Rúna Nolsøe. Tað tóktiskt sum verjan hjá FS Vágum ikki fylgdi heilt við í hesum álopinum, tí Carsten From var ógvuliga leysur við málverjanum. Nýggi áleyparin hjá HB helt høvdið kalt og sendi róliga framvið málverjanum.

HB helt fram við framfýsnum álopsspæli, tað sum eftir var av fyrra hálvleiki. Hetta bar ávøkst tíggju minuttir seinni.

Hesuferð var Rógvi Jacobsen á blettinum. FS Vágar megnaði ikki at rudda upp eftir eina frísparksstøðu í brotsteiginum, og bólturin endar hjá Janusi Joensen, sum sendir innfyri. Her er Rógvi Jacobsen hægstur og leggur HB framum við tveimum málum.

HB veruliga stýrdi dystinum fyri steðgin og ilt var at síggja, hvussu FS Vágar skuldi hótta HB-liðið. Hóast heimaliðið hevði yvirvág í leiki eftir steðgin, hevði tað ilt við at beina allan iva til viks.

Fuglfirðingurin Símun Eliasen er nú aftur at síggja á HB-liðnum, og hann spældi ein góðan dyst í verjuni.

### FS Vágar minkar um munin

Jens Erik Rasmussen var tann leikarin hjá FS Vágum, sum skuldi skapa nakað frameftir vøllinum, og hann var eisini upphavsmaðurin til teir báðar málmøguleikarnar, sum vágamenn fingu í seinna hálvleik.

Báðuferð var tað eftir uppspæl í vinstru síðu, at tann royndi miðvallarin gav HB-verjuni trupulleikar. Fyrru ferð sendi hann innfyri til brasilska leikaran Clayton Suares, men skotið hjá honum fór uppum málið. Hann var staddur tætt undir málinum og skuldi í minsta lagi havt rakt málið.

Aðru ferð Jens Erik brýtur ígjøgnum í vinstra borði endar tað við máli til FS Vágar. Hesuferð tveitir Elfinn Ørvarodd seg fram og prikar bóltin framvið Bárði Johannesen og minkar um munin.

Nú var dysturin brádliga spennandi aftur, tí hóast spælið fyri tað mesta fór fram á hálvuni hjá FS Vágum, so kundu teir hótta við skjótálopum.

FS Vágar kom nú eitt sindur meira við í dystin, og HB viðhaldsfólki fór at ótolnast. HB skuldi nú hava avgerandi málið fyri sláa sigurin fastan, men tað gekk heldur striltið hjá teimum, og FS Vágar stríddist nú meira manniliga.

### Rógvi slær sigurin fastan

Tá tíggju minuttir vóru eftir at spæla vísti miðvallarin Rógvi Jacobsen seg aftur sum ein vandamiklan harra. Rúni Nolsøe, sum legði upp til fyrsta og síðsta málið, brýtur ígjøgnum í høgru síðu og sendir eitt neyvt innlegg til Rógva Jacobsen, sum stútar í netið.

Nú var dysturin at kalla avgjørdur, og HB-ararnir kundu anda léttan. HB hevði greiða yvirvág allan dystin og skapti fleiri málmøguleikar enn mótstøðuliðið, men FS Vágar syrgdi fyri, at spenningur var í dystinum til tað síðsta.

HB misti ein mann í dystinum. Kári Nielsen varð stutt fyri steðgin borin av vøllinum við einum brotnum føti. Hann er lagdur í gips og verður neyvan at síggja aftur á liðnum fyrr enn um einar seks vikur.

Hetta var ein heldur trilvandi byrjan hjá meistaraliðnum, og HB-ararnir halda óivað, at dysturin gjørdist óneyðuga spennandi, tí teir skuldu havt avgjørt áðrenn. Hinvegin var FS Vágar til dystin fús, og gav ongantíð HB frið í sinni. Teir arbeiddu væl og góvu eisini heimaliðnum ein hvøkk í seinna hálvleiki, áðrenn HB fekk triðja málið.

**HB - FS Vágar 3-1 (2-0)**
1-0: Carsten From, 18
2-0: Rógvi Jacobsen, 29
2-1: Elfinn Ørvarodd, 63
3-1: Rógvi Jacobsen, 79
**HB:** Bárður Johannesen - Hallur Danielsen, Eli Thorsteinsson, Símun Eliasen, Janus Joensen - Kári Nielsen (Tór-Ingar Akselsen), Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Nicu Dogaru - Andrew av Fløtum, Carsten From (Hendrik Rubeksen)
**FS Vágar:** Jákup Joensen - Sjúrður Ellefsen, Albert Ari Thomassen, Jóhannus Joensen, Silva Braga - Ruslan Screlea, Jens Erik Rasmussen, Elfinn Ørvarodd (Birgir Joensen), Vlad Osipovs (Rói Árting) - Bjarni Prior (Jack Johansen), Clayton Suares